HVANNASUNDS KOMMUNA

# Kunngerð

Hervið verður gjørt kunnugt, at atkvøðugreiðsla til bygdarráðsvalið

**týsdagin 11. novembur 2008**

í Hvannasunds Kommunu fer fram í skúlanum á Fossánesi frá kl. 10:00 til kl. 20:00 ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

**Brævatkvøður:**
Sjófólk og onnur, sum ikki rokna við at verða heima valdagin, og veljarar, sum eru burturstaddir uttanlands, kunnu greiða brævatkvøðu í fyrsta lagi 4 mánaðir áðrenn valdagin.

Í øðrum førum skal brævatkvøðan verða avgreidd í fyrsta lagi 1 viku áðrenn valdagin, tað er 4. november 2008, og í seinasta lagi dagin fyri valdagin við at venda sær til kommunuskrivstovuna telefon 45 20 07 ella á telefon 58 58 91.

**Heimaval:**
Veljarar, ið vegna sjúku ella annað, ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagi dagin fyri valið við at venda sær til kommunuskrivstovuna og boða frá hesum áðrenn kl. 15.00 mánadagin tann 10. november 2008.

**Valkort:**
Valkort skulu nýtast til valavgreiðsluna og valkortini verða send út við postinum til allar veljarar, ið standa á vallistanum. Um onkur, sum heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt kommunuskrivstovuni frá sum skjótast.

Minnist til at hava valkortið við á val.

**Valnevndin í Hvannasunds Kommunu,**
31. oktober 2008
Thorleif S. Joensen, formaður

VÁGA KOMMUNA

# Kunngerð

Sum áður kunngjørt, verður val til bygdaráðið í vága kommunu týsdagin 11. novembur 2008.

Valstaðið fyri veljarar í verandi miðvágs kommunu er í miðvágs skúla.

Valstaðið fyri veljarar í verandi Sandavágs kommunu er á bygdaráðsskrivstovuni í Sandavági.

Veljarar, sum eru burturstaddir valdagin, kunna greiða atkvøðu á kommunuskrivstovunum í avgreiðslutíðini til og við mánadagin 10. novembur.

Tey, sum vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðið, kunna boða frá á kommunuskrivstovuni í Miðvági tlf. 332429, í Sandavági tlf. 344401 ella hjá valstýrunum tlf. 332569 (Torfinn Jacobsen) og 332376 (Gutti Petersen) seinast mánadagin 10. novembur kl. 1600.

**Valnevndin fyri Vága kommunu**
31.10.2008
Torfinn Jacobsen form.


## AQUA-VATN-AEROBIC
## VEKTKONTROL

## Í GØTU SKÚLA

**MIKUKVØLDIÐ 5. NOV. KL. 21.00.**

**SKEIÐIÐ VERÐUR FRAM TIL MARS MÁNAÐ**

Aerobic-instruktørur:
**GUÐRUN MALENA HANSEN**

**Vatn-aerobic – rørslur í vatni til tónleik við Aerobic-instruktøri, við kombinatión av venjingum, sum styrkja**

**BÚK | RYGG | ARMAR | RUMPU | LØR**

**Ring og tekna teg á tlf. 44 21 66 ella 27 31 64**

☺ **VIT SÍGGJAST**


NES KOMMUNA
650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

# Kunngerð

Samsvarandi lýstu kunngerð Innlendismálaráðsins fer kommunuval fram

**Týsdagin 11. november 2008**

Í fundarhølunum hjá Nes kommunu á Toftum.

Atkvøðutíðin er:

**Frá kl. 10.00 til kl. 20.00**

ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

**Brævatkvøður:** Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin ella á annað hátt lýka treytirnar fyri at greiða atkvøðu, kunnu í seinasta lagið dagin fyri greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

**Heimaval:** Veljarar sum vegna sjúku ella vantandi førleika, ikki kunnu møta við valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagið dagin fyri valið, við at boða frá til kommunuskrivstovuna tlf. 447586. innan kl. 15.00 hin 10.11.2008.

Brævatkvøður skulu verða valnevndini í hendi innan valið byrjar kl. 10.00 hin 11. nov. 2008.

**Valkort** til nýtslu við kommunuvalið hin 11. november 2008, vera send øllum veljarum í kommununi.

Um onkur, ið heldur seg hava valrætt í kommununi, ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at venda sær til kommunuskrivstovuna.

**NES KOMMUNA**

Runavíkar Kommuna

## Lýsing um brævatkvøður, valkort og valstøðini til kommunuvalið og skúlastýrisvalið í Runavíkar kommunu 11. november 2008

**BRÆVATKVØÐUR**
Veljarar í Runavíkar kommunu, ið sambært vallógina lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni í avgreiðslutíðini til og við 10. november 2008.

Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðið, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 417000 í seinasta lagi 10. november 2008 kl. 16.00.

**VALKORT**
Við hesum verður gjørt kunnugt, at til kommunuvalið verða valkort send øllum veljarum í kommununi.

Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt býráðsskrivstovuni frá í seinasta lagi 10. november 2008 á tlf. 417000

**VALSTØÐINI í Runavíkar kommunu til kommunuvalið og skúlastýrisvalið 11. november 2008:**

Fyri valstaðið í Runavík í Ítróttarhøllini í Runavík fyri bygdirnar: Skipanes, Søldarfjørður, Lamba, Lambareiði, Glyvrar, Saltangará, Runavík, Rituvík og Æðuvík.

Fyri valstaðið á Skála fer fram í pensionistahúsinum á Skála fyri bygdina: Skála

Fyri valstaðið í Skálafirði í skúlanum í Skálafirði fyri bygdina: Skálafjørður

Fyri valstaðið í Oyndarfirði í skúlanum í Oyndarfirði fyri bygdina: Oyndarfjørður

Fyri valstaðið í Elduvík í skúlanum í Elduvík fyri bygdina: Elduvík

Fyri valstaðið Funningsfirði í skúlanum í Funningsfirði fyri bygdina: Funningsfjørður

**Atkvøðugreiðslan byrjar KL. 10.00 fyrrapart og heldur fram til KL.20.00 – ELLA SO LEINGI VELJARAR MØTA UTTAN STEÐG.**

**Runavíkar Býráð**



## Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 598599)**